Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT

INPACT

FAE
VÁGA FLOGHAVN

# ÁRSFRÁSØGN

# 2011

V-tal: 566.713 \ K.nr. 1577 | apríl 2012 | P/F-skrás.nr. 4800

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2011** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 9 |
| Rakstrarroknskapur | 13 |
| Fíggjarstøða | 14 |
| Gjaldførisfrágreiðing | 16 |
| Notur | 17 |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2011 hjá P/F Vága Floghavn.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Sørvágur, tann 26. apríl 2012

**Stjórn**

Finnbogi Niclasen
stjóri

**Nevnd**

Kitty May Ellefsen
nevndarformaður

Evy Jacobina Jacobsen
næstformaður

Jørgen Krab Jørgensen
nevndarlimur

Jóhan Leivur Olsen í Niðristovu
nevndarlimur

Johnni Meinhard Poulsen
nevndarlimur

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann 26. apríl 2012

fundarstjóri

# Váttan frá óheftum grannskoðara

*Til kapitaleigararnar í P/F Vága Floghavn*

## Átekning til ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Vága Floghavn fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2011 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn, peningastreymi og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

INPACT AUDIT

## Váttan frá óheftum grannskoðara

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2011 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2011 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Vit hava, sum ásett í ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 26. apríl 2012

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
løggilt grannskoðaravirki

Jógvan Joensen
løggildur grannskoðari